Runavíkar Kommuna

## Leiðari til Dagrøktina á Skála

Runavíkar kommuna søkir eftir dagrøktarleiðara at byrja 01.09.2008, ella eftir nærri avtalu.

Dagrøktarskipanin á Skála er í løtuni normerað til 65 børn, sum verða ansa av 15 dagrøktarum. Í skipanini eru góð spælistovuhølir har økis/spælistovupedagogur leggur lag á og veitir ráðgeving.

Runavíkar kommuna hevur ítøkiligar ætlanir um at byggja barnagarð á Skála, sum skal standa klárur á heysti 2009. Barnaansingin á Skála verður tí fyri broytingum komandi árini og dagrøktartarleiðarin kemur at hava ein avgerandi leiklut í hesum arbeiði.

Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av dagrøktini. Tað verður væntað av umsøkjaranum, at hann á leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum, heldur fram við at menna dagrøktina. Umráðandi er, at umsøkjarin evnar at ganga nýggjar leiðir, dugir væl at samstarva og er sjónligur í sínum leiðarastarvi.

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Bert umsøkjarar við námsfrøðiligum prógvi ella líknandi kunnu søkja starvið.

Nærri fæst at vita um starvið, við at tosa við Jákup Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 22 64 49

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Runavíkar kommunu í hendi 15. august 2008, kl 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Postboks 139 · Heiðavegur 26 · FO-610 Saltangará

# Fólk søkist

**Vit søkja eftur smiðjun, stál skipasmiðjum, sveisarum, mekanikarum og líknandi til arbeiði í Noreg skjótast gjørligt.**

Arbeiði umfatar klassing, umvæling og nýgerð av boripallum, supplyskipum, nýbygningum o.ø. innan offshore ídnaðin.

Arbeiðstíðin er 4 vikur úti og 2 vikur heima.

Góð løn verður givin.

Meira fæst at vita um arbeiðið, umstøður og treytir við at ringja ella skriva til undirritaða felag.

OILWIND
**Pf. J. K. JOENSEN & SONUR**
Tlf 332 422 · Fax 333 222 · t-postur: oilwind@oilwind.fo
Uttanfyri arbeiðstíð kann ringjast til fartlf. 212 422

SUNDA KOMMUNA

## Starvsfólk til dagtilhaldið Blákolluna á Oyri

Søkt verður eftir fólki at skipa fyri í Dagtilhaldinum á Oyri, umframt at luttaka í menningini av eldraøkinum í kommununi sum heild. Byrjað verður 1. septembur 2008 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðin er sett til 20 tímar um vikuna.

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður, eigur at hava serligan áhuga fyri at skapa góðar karmar um eldraárini hjá borgarunum, so teir fáa ein innihaldsríkan og heilsugóðan gerandisdag.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **hósdagin 31. juli, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið á telefon 471022 ella 771023.

**Umsóknir skulu sendast til:**

**Sunda Kommunu**
Oyrarbakkavegur 3
400 Oyrarbakki

*Dagtilhaldið Blákollan lat upp 15. februar 2007. Har er opið hvønn týsdag og hósdag seinnapart. Dagtilhaldið er fyri borgarar úr allari kommununi og hevur støðugt vaksandi undirtøku. Skipað verður javnan fyri tiltøkum av ymsum slagi. Annars fáast fólk við ymiskt ítriv, kortspæl, læra seg at brúka teldu og við kropsvenjing.*

NES KOMMUNA
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Reingerðarfólk

Søkt Verður eftir fólki, at gera reint í Tofta skúla.

Reingerðin er umleið 21,5 tímar um vikuna frá 18. august 2008 at rokna.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og FKA.

Skrivligar umsóknir verða at senda til Nes kommunu, Toftavegur 3, 650 Toftir, í seinasta lagið 08. august 2008.

Nærri upplýsningar fáast við at venda sær til Nes kommunu tlf. 565000.

**NES KOMMUNA**



## Tvíhús til sølu á Heygsvegnum 16 Tórshavn

Talan er um eini nýgg tvíhús har alt er gjørt bæði innan og uttan.

Húsini eru í tveimun hæddum, á veghæddini eru 3 kømur, baðiverilsi, bryggers og gongd, á 1. hædd er stova og køkur við atgongd til altan, kamar við atgongd til altan og baðirúm.

Húsini liggja væl fyri, 10.min oman í býin, sera góðan sólargang og gott útsýnið.

Húsini verða seld um hóskandi boð fæst, minsta boð er 2.450.000 kr.

**VALBJØRN DALSGARÐ**
RYGSGØTA 20 FO-160 ARGIR
TLF 319279 MOBIL 512118 FAX 312118
MAIL VALBJORN@VALBJORN.FO
WWW.VALBJORN.FO

# Lærlingur til byggimarknaðin í

360°

Vit søkja eftir lærlingi til byggimarknaðin at byrja skjótast gjørligt.

Í lærutíðini fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving/arbeiðsgongd innan handil.

Í 360° starvast 20 fólk, og sum lærlingur fært tú innlit í alskynd viðurskifti viðvíkjandi kundarøkt, sølu og innkeypi.

**Førleikakrøv:**
Tað er eitt krav, at lærlingurin hevur FHS-útbúgving, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og annars ert fyrikomandi og røkin.

Meira fæst at vita um starvið á tlf: 510808

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn, skal vera okkum í hendi innan 15. August. Umsóknin skal sendast til:

360°
Postsmoga 3268 · 110 Tórshavn